# Gardenparty í Tórsgøtu

**Hesa vikuna er trummuviku hjá Tórshavnar kommunu, og Gunnlagur Briem úr heimskenda bólkinum, Mezzoforte, er í Føroyum í hesum sambandið. Seinnapartin í gjár undirvísti Gunnlagur Briem Ragnari Finnson í trummuspæli**

TRUMMUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*




*Ein spírandi føroysk rockstjørna, Ragnar Finnson, í læru hjá íslendska bólkinum, Mezzoforte*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Mezzoforte komu í 1982 við hittinum Gardenparty, ið varð nógv spælt kring knøttin. Mezzoforte hava fyrr verið í Føroyum og í samband við trummuvikuna er Gunnlagur Briem í Føroyum, her hann undirvísir í trummuspæli, og hevur skeið fyri fólki.

Ragnar Finnson sat so hugaligur og spældi, tá Sosialurin vitjaði Reinsaríið.

## Workshoppir

Hetta er sættu ferð, at Gunnlagur Briem er í Føroyum. Hann hevur fyrr spælt til millum aðrar Ólavsøkukonsertina fyri fáum árum síðani.

- Mær dámar væl at vera í Føroyum. Tað er ein verulig heilsubót, sigur trummuleikarin í Mezzoforte.

Í morgin verður workshop við Gunnlagur Briem, og longu er fullteknað.

- Eg fari at spæla eitt sindur av Mezzoforte tónleiki, og so fari eg at greiða luttakarunum frá, hvussu mann kann betra seg. Bæði í lívinum og sum trummuleikari, greiðir Gunnlagur Briem frá.

Í løtuni býr Gunnlagur Briem í Íslandi, men meginparturin av arbeiðinum gongur fyri seg uttanlands. Hann leggur stóran dent á, at hann er fegin um at vera í Føroyum, og fegin vil takka Kaj Johannesen og Jákupi Strøm fyri møguleikan at vera her.

## Góður íblástur

- Tað er feitt, at hann tímir at koma til Føroyar. Eg spæli ikki so nógv trummur, men tað er mega gott at fáa inspiratión, sigur Ragnar Finnson, sum vit øll kenna frá sendingini Talent hjá DR, har Ragnar Finnson kom á triðja plássið. Punkarin leggur afturat, at hann ikki veruliga kennir Mezzoforte, men hevur hoyrt lagið Gardenparty nakrar ferðir, eisini fortelur hann, at honum dámar allan tónleik, sum er góður, og at Gardenparty ikki er nakað undantak.

Trummur vera eisini á skránni í dag og í morgin í Tórsgøtu, og tað er Tórshavnarkvøldsskúli- og ungdómsráð, ið skipar fyri.

# Skúlavígsla í Runavík

**Í sambandi við at skúlin í Runavík er tikin í nýtslu, verður skipað fyri almennum hátíðarhaldi leygardagin 13. desember klokkan 14, har kommunan gera vart við, at øll eru hjartaliga vælkomin**

TÍÐINDASKRIV

Á skránni verða kórsangur og røður og næmingar úr skúlanum fara at framføra tónleik, fólkadans, føroyskan dans og sýna fram næmingaarbeiði.

Tað er byggifyritøkan Articon sum hevur staðið fyri arbeiðinum at byggja skúlan, sum byrjaði í oktober 2006. Sáttmálin millum Runavíkar kommunu og Articon er ein "partalagsavtala" og hevur arbeiðið verið skipað sum heildararbeiðstøka.

Skúlin í Runavík hýsir næmingum úr 4. –10. flokk, sum allir eru tvísporaðir. 1.–3. flokkarnir eru í skúlanum á Glyvrum.

Sum ein partur av skúlanum er bygdur ein mentanardepil, sum kann hýsa mentanarligum tiltøkum í kommununi, umfram at skúlin eisini fer at brúka hendan partin av bygninginum til tiltøk hjá skúlanum.

Umframt skúlastovur og bólkarúm hevur skúlin millum annað námsfrøðiligan tænastudepil, bókasavn, samkomuhøli, matarstovu, tónleikahøli, høli til skúlasjúkrasystir og NSR-ráðgeva.

Skúlin og mentanardepilin eru einar 5.000 fermetrar til víddar og lendið, ið útlagt er til skúlaøkið, er á leið 16.000 fermetrar, har av 5.000 fermetrar eru gjørdir til spælipláss, grasfløtur og ferðsluøki.

Nú skúlin í Runavík er tikin í nýtslu, eru skúlarnir í Rituvík og Søldarfirði niðurlagdir og verða brúktir til ávikavist barnaansing og handilsskúla.



*Runavíkar kommuna ger vart við, at øll eru hjartaliga vælkomin til hátíðarhaldið í nýggja skúlanum leygardagin klokkan 14*

*Savnsmynd*

Samsung SGH-U900

Jólagáva til undirhald

Sera snøgg slide fartelefon við 3G, 5MP myndatóli, 128MB minni, møguleika fyri at byggja minni út við MicroSD korti, FM útvarpi, Bluetooth og nógvum øðrum hentleikum. Battarí: 6,25 tímar talutíð og 407 tímar standby. Phonearena gav hesari telefonini 8.5 stig av 10 møguligum í test tann 08-02-2008.

Les meira á vodafone.fo
Vit eru eisini til tænastu á 202020.



kr. 2995
Vanligur prísur 3.750,-

Løtan er tín

vodafone